Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 27.10.2022 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Katrin Kjartansdóttir<br>Magnus Skoralíð<br>Marjun Andreasardóttir<br>Rúni Justinussen<br>Marita Klein Joensen<br>Petur Súni Jacobsen<br>Hjalti Dalheim<br>Hanna Jensen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | Ove Heinesen |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 46/22 | 22/00230-1 | 22/00230 - Frágreiðing og tilmæli til støðutakan til tilboð uppá gera Sniðgøtu í Haldarsmørk í Syðrugøtu (Inngarðsvegur, Salvarávegur, Traðarávegur, Garðabrekka) | 3 |
| 47/22 | 22/00336-4 | Innlegging av vatnleiðing til seyðahús | 6 |
| 48/22 | 22/00379-1 | Broyting av býraplaninum í Leirvík matr. nr. 147d | 8 |
| 49/22 | 22/00386-1 | 22/00386 - frágreiðing og tilmæli til - eykajáttan til filmsverkætlan - Trøllini og huldugentan | 9 |
| 50/22 | 22/00347-6 | 28/22 Samtykt Byggi - og býarskipanarnevnd, 22.09.2022 Serstøk byggisamtykt fyri sethúsaøki í Fløtugerði í Leirvík | 10 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 51/22 | 22/00353-2 | 22/00353: Reglugerð og nevnd - Húsið hjá Karli. | 12 |
| 52/22 | 22/00354-2 | 22/00354 - Frágreiðing og tilmæli til mál - Tillagaður Mentanarpolitikkur, 2022 | 13 |
| 53/22 | 22/00375-2 | Frágreiðing og tilmæli til mál 22/00375 - Eykajáttanir oktober 2022 | 14 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar**

## 46/22 22/00230 - Frágreiðing og tilmæli til støðutakan til tilboð uppá gera Sniðgøtu í Haldarsmørk í Syðrugøtu (Inngarðsvegur, Salvarávegur, Traðarávegur, Garðabrekka)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis - og trivnaðarnevndin | 21.06.2022 | 14/22 | 22/00230-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 27.06.2022 | 28/22 | 22/00230-1 |
| 3 Býráðið | 30.06.2022 | 39/22 | 22/00230-1 |
| 4 Umhvørvis - og trivnaðarnevndin | 18.10.2022 | 21/22 | 22/00230-1 |
| 5 Fíggjarnevnd | 24.10.2022 | 35/22 | 22/00230-1 |
| 6 Býráðið | 27.10.2022 | 46/22 | 22/00230-1 |

**Málslýsing:**

Umsitingin hevur bjóða arbeiði út at gera Sniðgøtu í Haldarsmørk í Syðrugøtu (Inngarðsvegur, Salvarávegur, Traðarávegur, Garðabrekka), og hevur móttikið tvey tilboð.

Tilboðsgevararnir eru:

- Sp/f JHR-Entreprenørar v. Høgna Petersen
- HUGO sp/f v.Hugo Skorastein.

Innkomið tilboð:

- HUGO sp/f Tilboð 372.332 + MVG
- Sp/f JHR-Entreprenørar Tilboð á 347.885,50 kr. + MVG

JHR Entreprenørar høvdu fyrivarni í teirra tilboði og tískil ynskti umsitingin at kanna nærri, hvat kostnaðurin av hesum varð. JHR og umsitingin hava verið á staðnum og eftirfylgjandi hevur JHR v. Høgna Petersen slept teirra fyrivarni. Tað merkir somuleiðis at teirra tilboð heldur.

---

**17. oktober 2022.**

Nú tá arbeiðið er farið í gongd við at gera sniðgøtuna Haldarsmørk í Syðrugøtu, hevur umsitingin gjørt uppskot og kostnaðarmeting til at gera gøtuna lidna, soleiðis at skilja, at tann verandi gøtan, sum í dag liggur á økinum eisini verður dagførd.
Talan er fylgjandi:

- Partur 1: Binda Garðabrekku í nýggju gøtuna (uppstig verandi gøtur, sum í dag liggur á økum)
- Partur 2: Binda gøtuna í Innangarðsvegin (uppstig verandi gøtur, sum í dag liggur á økum).

Eisini er eitt triðja alternativ nevnt í uppskotinum.

| |
|---|
| |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á konto 61411 – Fríðkan av bygdunum, sniðgøtum, spælipláss v.m. er samlað avsett kr. 630.000 á fíggarætlanini fyri 2022.<br>Kr. 180.000 av hesum peningi er játtað til annað endamál, og er tískil kr. 450.000 tøkar.<br>**17. Oktober 2022**<br>**Partur 1:**<br>• 147.240,00 kr. + Mvg - El er ikki írokna.<br>• 174.780,00 KR. + Mvg - El írokna<br>**Partur 2:**<br>• 114.520,00 kr. + MVG - El er ikki írokna.<br>• 135.940,00 kr. + MVG - El írokna |
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at taka av lægra tilboðnum á **347.885,50 kr. + MVG,** ið er JHR og seta arbeiði í gongd. |

**Umhvørvis - og trivnaðarnevndin 21. juni 2022**
Mæla til at taka av tilboðnum frá JHR og at umsitingin fer í samráðingar við JHR um møguleikar at tillaga gøtuna í mun til býráðssamtyktina 31. mars 2022 – mál 22/00118

**Fíggjarnevnd 27. juni 2022**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 30. juni 2022**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Umhvørvis - og trivnaðarnevndin 18. oktober 2022**
Mæla til at gera gøtuna sambært nyggjari tekning dagf. 19 oktober 2022 og peningur til arbeiðið verður tikin av konto «syðrugøtusand» og eykajáttan verður gjørd á uml. Kr. 150.000

**Fíggjarnevnd 24. oktober 2022**
Mæla til at fylgja tilmælinum hjá Umhvørvis – og trivnaðarnevndini

**Býráðið 27. oktober 2022**
Einmælt samtykt at gera gøtuna sambært «Dagføring av verandi gøtu part 1. og 2». Peningur til arbeiðið verður sambært tilmælinum hjá Umhvørvis – og trivnaðarnevndini dagf. 18. oktober 2022.

## 47/22 Innlegging av vatnleiðing til seyðahús

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 19.10.2022 | 10/22 | 22/00336-4 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.10.2022 | 36/22 | 22/00336-4 |
| 3 Býráðið | 27.10.2022 | 47/22 | 22/00336-4 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Festarin av matrikul nr. 334 undir Gøtueiði hevur sent umsókn, har hann ynskir at fáa vatn lagt til seyðahúsið.<br><br>Festarin hevur útbygt seyðahúsið og hevur ætlanir um, at reka vinnulig virksemi. Ætlanin er, at fletta og hagreiða tilfeingið hjá festinum fyri at bøta um raksturin hjá festinum.<br><br>Tørvur er tí á, at fáa reint vatn lagt til seyðahúsið, fyri at kunna reka hetta virksemi. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 250.000,- kr. um arbeiðsmenninir leggja leiðingin |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at játta umsóknini |

**Vinnunevndin 19. oktober 2022**
Meirilutin í Vinnunevndini tekur undir tilmælinum hjá umsitingini, og Petur Súni tekur støðu á komandi býráðsfundinum

**Fíggjarnevnd 24. oktober 2022**
Per Martin Gregersen mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.
Hjalti Dalheim og Magnus Skoralíð taka støðu á komandi býráðsfundi

**Býráðið 27. oktober 2022**
Hjalti Dalheim leggur fram broytingaruppskot, sum er soljóðandi:
*Vatnleiðingin verður løgd til seyðhúsið.*
*Eysturkommunan veitir tilfar (vatnrør, vm.), festarin leggur leiðingina og ber kostnaðin av hesum og at arbeiðið verður gjørt í samráð við teknisku umsiting hjá kommununi.*

Einmælt samtykt at taka undir við broytingaruppskotinum hjá Hjalta Dalheim

## 48/22 Broyting av býraplaninum í Leirvík matr. nr. 147d

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 20.10.2022 | 32/22 | 22/00379-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | | | 22/00379-1 |
| 3 Býráðið | 27.10.2022 | 48/22 | 22/00379-1 |

**Málslýsing:**

Ynski er um at víðka matr. nr. 147d í Leirvík frá "B2, bústaðarøki" til "H, Frílendi".

Markeraða øki á kortskjal "Broyting av býarplaninum í Leirvík mart. Nr. 147d" vísur øki, ið ynski er at broyta til "H-øki, Frílendi".

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Ongar

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til, at góðkenna uppskotið um at broyta býarplanin fyri Eysturkommunu í Leirvík smb. skjølum í málinum

**Byggi - og býarskipanarnevnd 20. oktober 2022**

Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini

**Býráðið 27. oktober 2022**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og og býarskipanarnevndini

## 49/22 22/00386 - frágreiðing og tilmæli til - eykajáttan til filmsverkætlan - Trøllini og huldugentan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 24.10.2022 | 38/22 | 22/00386-1 |
| 2 Býráðið | 27.10.2022 | 49/22 | 22/00386-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Mentanarnevndin hevur dagf. 21.10.2022 havt fundi við toymi handan filmsverkætlanina “Trøllini og huldugentan”.<br>Toymi søkir um stuðul á kr. 65.000 til endamálið. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Eingin peningur er tøkur til endamálið á fíggjarætlanini fyri 2022 og er eykajáttan neyðug um stuðul skal latast. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til eykajáttan á kr. 65.000 til at stuðla filmsverkætlanini. |

**Fíggjarnevnd 24. oktober 2022**
Mæla til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini

**Býráðið 27. oktober 2022**
Einmælt samtykt at taka undur til tilmælinum hjá Fíggjarevndini

## 50/22 28/22 Samtykt Byggi - og býarskipanarnevnd, 22.09.2022 Serstøk byggisamtykt fyri sethúsaøki í Fløtugerði í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 20.10.2022 | 31/22 | 22/00347-6 |
| 2 Býráðið | 27.10.2022 | 50/22 | 22/00347-6 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevnd | 25.10.2022 | 33/22 | 22/00347-6 |

**Málslýsing:**

Serstøk byggisamtykt er gjørd fyri útstykkingin í Fløtugerði í Leirvík. Útstykkingin liggur í einum B2 økið. Umsitingin hevur arbeitt við at gera eina serstaka byggisamtykt, ið hóskar til útstykkingina.
Í stuttum, so inniheldur serstaka byggisamtyktin hæddarviðurskifti, frástøðu til mark (byggilinjur) v.m. Víst verður til skjøl í málinum.

**Ískoyti:**
Serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri nýggju útstykkingina í Fløtugerði í Leirvík, sí skjøl í málinum.

**Ískoyti:**
Punkt 4.2 í serstøku byggisamtyktini er broytt til soljóðandi:

- Á hvørjum grundøki kann byggjast eitt sethús, sum eisini kann hava eina minni íbúð.

Punkt 4.3 Mest loyvdu hæddir, er broytt til soljóðandi:

- Hús omanfyri vegin við einari hædd og lofti, skal hallið á takhæddini ikki vera meira enn 45 stig og hæddin 8,25 m frá planeringshæddini og upp til húsamønina, sí skjøl í málinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til at samtykkja serstøku byggisamtykt fyri økið í Fløtugerði í Leirvík

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. september 2022**
Málið tikið av skrá

**Byggi - og býarskipanarnevnd 20. oktober 2022**
Málið tikið av skrá

**Byggi - og býarskipanarnevnd 25. oktober 2022**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við umsitngini, við hesi viðmerking:

Punkt 4.3 Niðanfyri vegin
Hús niðanfyri veg kunnu byggjast við einari hædd, yvir vegkotu og kjallara niðanfyri vegkotu. Hesi kunnu ikki byggjast við høgari mønureising. samb. Kortskjali 2.

**Býráðið 27. oktober 2022**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi - býarskipanarnevndini

## 51/22 22/00353: Reglugerð og nevnd - Húsið hjá Karli.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | | | 22/00353-2 |
| 2 Býráðið | 29.09.2022 | 45/22 | 22/00353-2 |
| 3 Býráðið | | | 22/00353-2 |
| 4 Býráðið | 27.10.2022 | 51/22 | 22/00353-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi uppskot til reglugerð fyri Húsini hjá Karli |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Hetta málið var á skrá hjá mentanarnevndini 27. september 2022, har avgjørt varð at fáa reglugerðina fyri byráðið.<br>Umsiting mælir til, at býráðið velur nevndina vísandi til skriv "Skipan av nevndini hjá Húsinum hjá Karli, dagf. 19. Oktober 2022. |

**Býráðið 29. september 2022**
Einmælt samtykt at góðkenna fyriliggjandi uppskot til reglugerð.

**Býráðið 27. oktober 2022**
Einmælt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingin og Rúni Jusitnussen er valdur í nevndin umboðandi Umhvørvis – og trivnaðarnevndina

## 52/22 22/00354 - Frágreiðing og tilmæli til mál - Tillagaður Mentanarpolitikkur, 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 27.10.2022 | 52/22 | 22/00354-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Umsitingin hevur, saman við Mentanarnevndini tillaga Mentanarplitikkin fyri Eysturkommunu<br>Onkrar smáar tillagingar eru gjørdar. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðing |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at samtykkja fyriliggjandi uppskot |

**Býráðið 27. oktober 2022**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini - vísandi til skjal «Mentanarpolitikkur» dagf. 27. oktober 2022

## 53/22 Frágreiðing og tilmæli til mál 22/00375 - Eykajáttanir oktober 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 24.10.2022 | 37/22 | 22/00375-2 |
| 2 Býráðið | 27.10.2022 | 53/22 | 22/00375-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi yvirlit yvir eykajáttanir. Talan eru um eykajáttan á íalt 2.515.000,00 kr. harav 350 t.kr er til rakstur og 2.165.000,00 kr. til løgur.<br><br>Peningurin kann takast av innistandandi, men av tí at ikki øll játtanin til nýggja dagstovnin við Gøtugjógv verður brúkt í inniverandi ári, kann peningur eisini takast av hesi konto. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Um tikið verður undir við tilmælinum hevur hetta ongar fíggjarligar avleiðingar, uttan tað at løgujáttanin til nýggja dagstovnin verður lækkað samsvarandi eykajáttanunum. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita eykajáttan samb. fyriliggjandi yvirliti, og at peningurin verður tikin av konto 3.26.11.511-10 (Løgujáttan til nýggja dagstovnin) |

### Fíggjarnevnd 24. oktober 2022
Mælt verður til at veita eykajáttan samb. fyriliggjandi yvirliti og at peningur verður tikin av innistandandi.

### Býráðið 27. oktober 2022
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Fíggjarnevndini

fundurin lokin 19:00

______________________
Per Martin Gregersen

______________________
Katrin Kjartansdóttir

______________________
Magnus Skoralíð

______________________
Marjun Andreasardóttir

______________________
Rúni Justinussen

______________________
Marita Klein Joensen

______________________
Petur Súni Jacobsen

______________________
Hjalti Dalheim

______________________
Hanna Jensen